








# Frálíki trubadururin Stanley

**Stanley Samuelsen prógvaði so dyggiliga, at hann telist millum okkara bestu trubadurar, tá hann framførdi á Asfalt leygarkvøldið**

ASFALT
*Sveinur Dam*
*sveinur.dam@gmail.com*

Miðlahúsið var nærum fult leygarkvøldið, tá Stanley Samuelsen framførdi í samband við Asfalt.

Við framúrskarandi guitarspæli og góðum sangi, vísti Stanley Samuelsen, at hann telist millum heilt stóru trubadurarnar, ið vit eiga.

Stanley Samuelsen borðreiddi við eini perlurekkju av løgum, bæði egin løg, umframt yrkingar, ið hann hevur lagt lag til, og okkurt lánilag varð eisini pláss fyri.

Eftir míni meting telist Stanley millum bestu guitaristarnar í landinum, og spæl hansara ljóðar til tíðir, sum um fleiri guitarar eru í spæli í senn. Avgjørt ein stór styrki, tá hann er einsamallur á pallinum.

## Eitt sindur av hvørjum

Sum sagt spældi Stanley Samuelsen bæði egin og lænt løg. Av sínum egnu løgum, spældi hann millum annað tað vakra "Tá eg verði gamal", ið snýr seg um at hava ein, tú elskar, við tína lið, tá tað líður móti endanum. Lagið er rættiliga sorgblítt, og hann syngur so inniliga, at ein verður heilt rørdur. Sera væl eydnað, eins og tað mesta, sum hann ger.

Stanley framførdi eisini tvey enskmælt lániløg, ið riggaðu heilt væl. Hetta vóru veir vælkendar fólkasangir, nevniliga "The last thing on my mind", ið Tom Paxton skrivaði fyrst í sekstiárunum, og klassiska spiritual sangin "Poor wayfaring stranger".

Lagsmiðurin Stanley slapp eisini framat, tá hann spældi lagið "Regn", sum er yrking hjá Mikkjal á Ryggi, ið Stanley hevur smíðað lag til. Eitt dramatiskt lag, ið hóskar stak væl til yrkingina.

Stanley prógvaði so dyggiliga, at hann telist millum okkara bestu trubadurar, og vónandi verður eisini nógv at hoyra til hann í framtíðini.



*Stanley Samuelsen hugtók við framúrskarandi guitarspæli og góðum sangi*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

**Meira um Asfalt í blaðnum í morgin**

# Fólk elska Páll Finnur Páll

**Fólk skrálaðu seg hás til pallvandu entertainerarnar Páll Finnur Páll**

ASFALT
*Sveinur Dam*
*sveinur.dam@gmail.com*

Páll Finnur Páll fóru á pall í FUTT-tjaldinum á vaglinum klokkan 23 um kvøldið.

Teir eru kanska fólkakærasti bólkurin í landinum í løtuni, og við eini ørgrynnu av hittum í skjáttuni kann tað ongantíð ganga heilt galið hjá Páll Finnur Páll.

Leygarkvøldið tóktust teir tó hava eitt sindur av byrjanartrupulleikum. Hetta komst kanska av at FUTT-tjaldið nóg illa var hálvfult, og tá kann tað er trupult at fáa samband við fjøldina. Men tað skuldi blíva betri, og móti endanum vóru teir aftur á toppinum.

Tá løg sum "Forelskaður sjónleikari" og "Eg" ljóða úr hátalarunum, kann tað vera trupult, ikki at syngja við, og tað tóktist at sparka Páll Finnur Páll í gongd, tá fjøldin tók undir at syngja. Teir eru vanir við at hava fjøldina um lítlafingurin, og so bleiv eisini leygarkvøldið. Ein perlurekkja av hittum fingu fólk at skrála seg hás, og tað er eyðsýnt, at meira pallvandar menn skalt tú leita leingi eftir.

Páll Finnur Páll verða av mongum sammettir við Frændur, og tað er ikki heilt uttan grund, tí teir hava næstan ikki latið eitt einasta lag úr hondunum, sum ikki er vorðið fólkaogn millum ungdómin. Av tí sama eru teir altíð eitt upplivilsi á pallinum, har teir vísa seg sum rættir entertainarar. Fólkini elska tað.



*Páll Finnur Páll ikki bara spældu sjálvir – teir tóku sær eisini stundir at lurta meðan onnur spældu*

*Mynd: Rólant Waag Dam*